## Berlusconi blandar seg

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, sum eigur stóra fótbóltsfelagið, AC Milan, blandar seg nú uppí, hvussu nógva løn, spælarar skulu fáa. – Eitt lønarloft skuldi verið, tí spælaralønirnar eru fullkomuliga óveruligar. Serliga í so ringum tíðum, sum nú, sigur hann. Berlusconi sigur seg hava tosað við UEFA-forsetan, Michel Platini, um málið og at teir báðir eru samdir.



## Eingin var dopaður

Allir finalistarnir í 100 metra finaluni hjá monnum undir HM-kappingini í Berlin, vóru dopingfríir. Tað staðfestir altjóða sambandið fyri frælsan ítrótt, IAAF. Týsdagin hoyrdist graml í krókunum um, at ein av rennarunum var fallin í dopingeftirlitinum, og fleiri týskir miðlar søgdu, at tann seki var Daniel Bailey, sum gjørdist nummar fýra. Men nú eru bæði hann og hinir í finaluni fríkendir fyri allan illgruna.

ÍF-B36 1-1 (1-1):

# Bæði vildu vinna

ÍF

B36

**Hóast ferðin á spælinum ikki var høg og kjansirnir ikki nógvir, var týðiligt, at bæði ÍF og B36 vildu vinna dystin í Fuglafirði. Liðini skiftust um at hava yvirvág, og bæði mundu hava sínar løtur, har tey vóru nøgd við javnleikin**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fyri bæði ÍF og B36 hevði tað nógv at siga, at tað ikki var drigið svart, tá liðini í gjárkvøldið møttust í Fuglafirði. ÍF, sum hevði vunnið síðstu tveir dystirnar, jagstraði triðja sigurin á rað, ið kundi givið vissu fyri, at liðnum ikki nýttist at hyggja niðureftir, og B36, sum hevði tapt síðstu fýra dystirnar, vildi sleppa frá at hava KÍ andandi í nakkanum.

Hóast tað í løtum regnaði illa, vóru umstøðurnar rímiligar til fótbólt, tí á sjálvum vøllinum var ikki tann nógvi vindurin. Og hóast regnið, var heilt fitt av fólki og hugdi, og enntá vóru nógvir av drúgvastu stuðlunum hjá útiliðnum komnir allan vegin at stuðla, nú tað stóð á gomlum nøglum.

Tað var annars um reppið, at ÍF longu innan fyri fyrstu trýggjar minuttirnar hevði lagt seg á odda við tveimum málum. Fyrri møguleikin kom beinanvegin og áðrenn B36 nakrantíð hevði havt bóltin á fótum. Bara eini 10 sekund vóru farin, tá Andy Olsen streyk avstað í vinstru síðu og sendi innfyri, har Nenad Saric kom stormandi úr høgru. Nenad skuldi bara seta fótin á, so var mál. Tað gjørdi hann eisini, men hann lyfti upp undir bóltin, so skotið úr fríari støðu endaði við síðuna av.

Lítla løtu seinni vóru aftur boð eftir B36, tá Balazs Sinko var spældur leysur millum Poul Arna Jacobsen og Klæmint Matras, sum hesa ferð mannaðu B36-miðverjuna, men avgerandi skotið gjørdist eitt neyðaregg, og so spurdist einki burturúr.

### Flott útjavning

Hetta var sjálvandi ein skelkur fyri B36, men tað sást, at B36 veruliga kendi knívin á barkanum, tí nógv var lagt fyri at vinna seg inn í dystin. Tað eydnaðist eisini, og eftir fyrstu skinklandi løtuna komu gestirnir fyri seg og spældu fínt í eina góða løtu, meðan ÍF hevði trupult við at fóta sær aftur og byggja víðari á frálíku byrjanina.

Tað var tí ikki óuppiborið, at B36 legði seg á odda, tá lítil hálvur tími var farin. Hesa løtuna hevði B36 bóltin nógv, og ÍF hevði trupult við yvirhøvur at fáa fatur á honum. Eftir eitt hornaspark royndi ÍF at fáa bóltin burtur, men B36 bleiv við at vinna hann, og at enda kom Magnus Olsen í góða støðu og setti bóltin í málið til 1-0.

Eisini eftir málið tóktist B36 hava stýr á tí í eina løtu, men so byrjaði ÍF at rakna við aftur. Liðið gjørdi færri feilir og hevði eina góða løtu fram ímóti hálvleikssteðginum, tá útjavningin eisini kom – heldur ikki óuppiborið. Hetta var eitt typiskt og sera gott Andy Olsen-mál, har hann fekk fatur í bóltinum í høgru síðu og smekkaði væl til við vinstra beini, so bólturin sat í handara síðunetinum. Ein perla, og so var 1-1.

### ÍF kundi tikið alt

Eftir steðgin sá eisini út til, at ÍF fekk betru byrjanina, men tað vardi bara í eina løtu, so hevði B36 aftur fingið gongd á sítt spæl. Serliga á miðvøllinum royndust gestirnir væl, har Odmar Færø gekk undan og vann eina rúgvu av bóltum. Hesa løtuna kundi B36 avgjørt dystin, tá Jákup á Borg sendi André Riel avstað í vinstru síðu. Hann kom til baklinjuna og spældi útfrá, har Róaldur Jacobsen var í góðari støðu mitt í brotsteiginum, men ikki fekk ordiligt skot á, so Gango lættliga fekk fatur í bóltinum.

Sum dystinum leið, tóktust teir frá árstalsfelagnum onkurvegna vera nøgdir við javnleikin, og eitt stig eru nú eina ferð betri enn einki stig. Tað kanska eisini gav ÍF høvi at mennast aftur, og fuglfirðingar tóku av, og síðstu løtuna vóru tað meira teir, ið settu dagsskránna.

Tað var eisini um reppið, at ÍF stakk av við øllum trimum stigunum í yvirtíðini, tá Frank Poulsen sendi eitt gott fríspark innfyri. Bólturin var ætlaður høvdinum á innskifta Rógva Jacobsen, sum tó ikki fekk givið bóltinum kós, og tískil broyttist úrslitið einki.

Við javnleikinum er trýstið framvegis stórt á B36, sum nú hevur KÍ bara eitt stig aftan fyri seg. So er spurningurin, hvussu tað spælir av, tá júst B36 og KÍ hittast í Havn sunnudagin. Fyri ÍF er støðan á einari leið, hóast javnleikin, tí framvegis eru fuglfirðingar fimm stig framman fyri B36.



**Jákup á Borg, B36, roynir at smoyggja sær fram við Andy Olsen og Balazs Sinko, ÍF, í dystinum í Fuglafirði í gjárkvøldið, sum endaði við javnleiki**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Góður innsatsur

Eftir nakrar lakar dystir, har B36 hevur tapt, tí ov lítið hevur borið til, var Jákup á Borg nøgdur við tað, sum liðið vísti í Fuglafirði í gjárkvøldið.

– Tað var ein fínur arbeiðsinnsatsur, har allir arbeiddu fyri sakini og stríddust. Ikki minst var Odmar Færø góður á miðvøllinum, segði hann.

– Úrslitið er so nakað annað, tí vit høvdu ætlað okkum øll trý stigini. Hinvegin er tað kanska ikki so galið at fáa ein javnleik ímóti ÍF, sum hevur verið í einum góðum stima í síðstuni, og eitt stig er so frægari enn einki.

Sunnudagin spælir B36 avgerandi dyst á heimavølli ímóti KÍ, og tí heldur Jákup á Borg eisini, at tað kom sera væl við, at liðið nú fekk víst eitt avrik, allir menn kundu vera nøgdir við.

– Hesum høvdu vit brúk fyri, tí dysturin ímóti KÍ er altavgerandi. Tað hevur verið ov langt ímillum tær góðu upplivingarnar hjá okkum, so tí var tað sera gott, at vit fingu eina slíka, áðrenn vit veruliga skulu upp til roynd, segði hann.

*hil*

## Ikki ætlanin

– Hetta var ikki tað, vit ætlaðu. Tvørturímóti ætlaðu vit at vinna og fáa tað yvirstaðið, so vit kundu gerast leysir av botninum og fokusera upp á onnur ting.

Tað staðfesti annar av venjarunum hjá ÍF, Jón Símonsen, eftir javnleikin ímóti B36 í gjárkvøldið, ið ikki gjørdi støðuna hjá ÍF verri – men heldur ikki betri.

– Hinvegin má eg ásanna, at tá eitt korter var eftir av dystinum, vildi eg gleðiliga selt hann fyri ein javnleik, tí B36 hevði so nógv av spælinum tá. Men ímóti endanum komu vit væl við aftur og kundu fyri tað havt vunnið, segði hann.

*hil*